PÁL JOENSEN TIL EM Í UNGARN

## Miðlarnir varpa ljós á Føroyar

Úrslitini hjá Páli Joensen hava vaks ans í Evropa.

Allan Nielsen hevur skrivað um evropameistarakappingina í Budapest fyri danska Politiken. Aftaná kappingina í 1500 metra frísvimjing mikudagin, ivaðist hann ikki, at Pál Joensen hevur framt størsta føroyska ítróttarbragd nakrantíð.

- Er ein fótbóltssigur á Eysturríki størri enn eitt silvurmerki í EM-kapping? Nei, ha?, byrjar Allan Nielsen sína grein á heimasíðu hjá Politiken.

Stóra bretska blaðið, Daily Telegraph, metir, at silvurheiðursmerkið hjá Pál verða eina risasensation, sum føroyingar av álvara skulu hátíðarhalda.

Blaðið skrivar, at føroyingar skulu hátíðarhalda úrslitini við einum almennum frídegi. Serliga, tá tú hugsar um mongu stórtapini, sum føroyska fótbóltslandsliðið hevur lagt rygg til, skrivar blaðið.

Daily Telegraph varpar eisini ljós á vánaligu venjingarumstøðurnar í Føroyum.

**- uni**

## Nýtt føroyskt met í 50 metra bringu-svimjing

Pauli Ø. Mohr setti nýtt føroyskt met í 50 metra bringusvimjing fríggjamorgunin. Hann svam í innleiðandi riðlinum í EM í Budapest, men hann var ov stuttur til eitt finalupláss.

Hann kom á mál við tíðini 31.39 sekund.

Gamla metið er frá 2008. Dánjal Martin Hofgaard hevur sitið á metinum seinastu tvey árini, sum hann slóð undir Reykjavík International Games.

Fyrrverandi metið var 32.36 sekund.

**- uni**

# MEÐAN VI

**Tað er stór undirtøka fyri at byggja ein 50 metra kappingarhyl í Føroyum. Meðan vit bíða eftir einum hyli, eru tað fleiri knútar, sum skulu loysast**

Uni Holm Johannesen



Craig Lord er ítróttarskrivari hjá Swimnews Online. Hann er týðiliga bergtikin av megnaravrikinum hjá Páli Joensen, sum venur í einum lítlum svimjihyli í Vági, men framvegis er førur fyri at bjóða teimum sterkastu í Evropa av.

Aftaná, at Pál Joensen hevði fingið handað sítt silvurheiðursmerki mikudagin í farnu viku, ivaðist Craig Lort ikki, hvør er komandi uppgávan hjá landsins ovastu í Føroyum.

- Build that man a pool and name it after him!, heitti hann á føroyingar.

Kjakið um ein 50 metra kappingarhyl hevur av álvara tikið seg upp seinastu dagarnar.

Tað vísir seg, at fáar røddir mótmæla at byggja ein kappingarhyl í Føroyum. Spurningurin er, hvør skal ganga á odda í verkætlanini.

### Skulu hava svimjihyl

Rókur í Jákupsstovu, sum er næstformaður í Svimjisambandinum, hevur gjørt greitt, at Svimjisambandið hevur ongan møguleika at fíggja einum svimjihyli.

- Vit kunnu bara vísa á tey framúrskarandi úrslitini, sum føroysk svimjing hevur fingið seinastu árini og vóna, at landsins leiðarar gera vart við trupulleikan, hevur hann sagt.

Jón Bjarnason hevur sagt, at fyrimyndarliga samstarvið millum hann og Pál Joensen kann fáa ein bráðan enda, um eingin hylur verður bygdur. Pál Joensen umhugsar at flyta av landinum, tí hann fær bara vant á stutthyli í Føroyum. Tað er ikki nøktandi, um hann framhaldandi ætlar sær at svimja evropeisk heiðursmerki heim til Føroya.

- Eg eri farin undir eina stóra verkætlan við ungum svimjarum í Suðuroynni, sum eg ikki kann renna undan. Eg fari neyvan við, um Pál Joensen flytir úr Føroyum, hevur Jón Bjarnason staðfest.

Aftaná, at Pál Joensen kom á málið sum nummar fimm í 800 metra frísvimjing fríggjadagin, slóð venjarin eisini rimmar fast, at Pál Joensen hevði fingið betri úrslit, um hann hevði møguleikan at venja í kappingarhyli í Føroyum.

- Vit práta ikki um, at hann kanska hevði fingið betri úrslit. Hann hevði fingið betri úrslit, sigur Jón Bjarnason.

Helena Dam á Neystabø er landsstýriskvinna í Mentamálum. Hon segði við Rás2 fríggjadagin, at Pál Joensen skal sjálvsagt hava møguleikan at búgva í Føroyum, um hann ynskir tað. Tí skal svimjihylurin raðfestast høgt, ger hon greitt.

- Tað er ikki ofta, at Føroyar hava ein ítróttarúrmæling, sum kappast millum tey bestu í Evropa. Vit skulu syrgja fyri, at føroysk svimjing fær góðar og tryggar karmar. Føroyar hava longu fingið eina rúgvu av umrøðu, orsakað av stórslignu úrslitunum hjá Páli Joensen, segði Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, í viðtalu við Rás2.

Um vikuskiftið vísti Jógvan Arge, formaður í mentamálanevndini í Havn, eisini sín stuðul til verkætlanina. Hann sigur, at orðini hjá Helenu Dam á Neystabø eru fyrndarorð.

- Hatta vóru júst nøkur av teimum orðum, sum vit bíðaðu eftir at hoyra frá landsins myndugleikum. Tað eru teir, sum eiga at taka meginpartin upp á seg í hesum átaki. Annar spurningurin er so, hvussu hetta kann skipast best, skrivar Jógvan Arge í skrivi til fjølmiðlarnar.

### Hvat nú?

Tað er stór undirtøka fyri at byggja ein kappingarhyl, sum lúkar altjóða treytir. Spurningurin er nú, hvør tekur ábyrgdina á sínar herðar.

Hvør? Hvar? Nær?, eru millum knútarnar, sum skulu loysast.

Men tað er greitt, at Pál Joensen, Jón Bjarnason, Svimjisambandið og onnur skulu bíða í nøkur ár afturat, tí ein slíkur hylur verður ikki reistur eftir einum degi.

*uni@sosialurin.fo*